## Kappsigling á Skálafjørðinum

Àrliga kappsiglingin við 4- og 5-mannaførum, ið Lions Club, Eysturoy skipar fyri, verður á Skálafirði sunnudagin hin 20 august 2006 kl 15. Hetta er 37.árið á rað, at siglt veðrur, og í miðal hava bátarnir verið um 30 í tali.

Hvussu siglt verður eftir fjørðinum í ár verður støða tikin til sunnumorgunin, og fáa bátarnir boð um hetta, tá teir samlast í Heyggstøð á Strondum kl.14 seinnapartin. Málið verður við høvuðspierin í Runavík, og sum vanligt hevur verið, so fáa luttakarnir ein drekkamun við pannukøkum í kantinuni hjá Føroya Fiskavirking, Runavík aftaná siglingina, og verða tá samstundis steyp latin til 3 teir fremstu bátarnar.



## Fara at svimja runt vágna

Eitt av tiltøkunum, sum verður á sjómannadegnum í Klaksvík um vikuskiftið, er, at skipað verður fyri svimjing um vágna. Tað er Faroe Dive, sum skipar fyri kappingini. Teinurin, sum skal svimjast, er um 400 metrar, og roknað verður við, at hampuliga nógvir luttakarar vera. Eftir ætlan byrjar kappingin klokkan 11 leygardagin.

-mørk

## VB/S fingið nýggjar venjarar

**Nú er gjørt av, hvør skal venja VB/ Sumba restina av kappingarárinum. Ein vágbingur og ein klaksvíkingur skulu leiða liðið**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nevndin í VB/Sumba hevði týskvøldið fund um venjaraspurningin í felagnum, eftir at Ole Andersen varð sagdur úr starvinum fyri einari viku síðani.

Seinasta vikuskiftið høvdu teir báðir fyrrverandi VB-spælararnir, Bjarni Johansen og Eyðun Jacobsen, ábyrgdina av liðnum, men tað var ein fyribilsloysn, meðan arbeitt varð við at finna eina meira varðandi loysn.

Og tann loysnin er nú funnin, tí Bjarni Johansen og Finn Johannesen skulu venja VB/Sumba tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum. Teir báðir skulu hava ábyrgdina av liðunum hjá VB/Sumba í Formuladeildini og í 1. deild.

Bjarni Johansen er vágbingur og var fram til endan av kappingarárinum í fjør málmaður hjá VB. Hann spældi heilar 304 dystir fyri VB og VB/Sumba, og hann hevur eisini spælt á landsliðnum. Nú er Bjarni í holt við venjaraútbúgvingina hjá FSF og hevur nú fingið sína fyrstu stóru uppgávu í barndómsfelagnum.

28 ára gamli Finn Johannesen er klaksvíkingur, men býr nú í Vági. Hann hevur verið venjari í eitt nú KÍ, NSÍ og B36, og seinastu tíðina hevur hann hjálpt til í VB/Sumba. Finn er eisini hjálparvenjari hjá U17-landsliðnum, og hann tekur í løtuni hægstu føroysku venjaraútbúgvingina. Fyrsti dysturin hjá Finn sum venjari hjá VB/ Sumba verður ímóti KÍ í heimstaðnum Klaksvík.

# Óhugnaliga sterkir

**Føroyski landsliðsskiparin heldur, at ein av stóru styrkjunum hjá Georgia var, at teir ongan tíð tóku sær av løttum. Heldur ikki hóast sigurin var vísur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast fleiri vildu vera við, at talan mest sum er um nýggja lærutíð hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, so helt føroyski liðformaðurin ikki, at vantandi rutina var fremsta orsøkin til stóra tapið fyri Georgia.

– Tað haldi eg als ikki var orsøkin. Vit spæla í dag móti einum rættiliga sterkum liði, og tað er fremsta orsøkin til, at tapið varð so stórt. Sjálvt um eisini helt tað vera ov stórt.

– Men tað er so eisini ein sannroynd, at vit eru ov nógvir, sum ikki spæla upp til tað, sum vit eru mentir. Tað er nakað, sum føroyska fótbóltslandsliðið ikki hevur ráð til, og tað kostar nógv, tá so er.

*Tað tykist eisini, sum hava tit altíð trupulleikar, tá tit spæla móti londunum eystanfyri. Er tað eisini nakað um tað?*

– Avgjørt. Tekur tú dystirnar, sum vit hava spælt móti eitt nú Fraklandi, so settu teir ferðina niður, tá sigurin var tryggjaður. Tað gera hesi londinin ongantíð. Tey spæla sítt spæla frá fyrsta til seinasta bríksl, og tí er vandin fyri einum veruligum skrædli eisini størri í slíkum dystum. Og tað var tað, sum hendi í dag. Vit verða gjøgnum alllan dystin revsaðir fyri hvørt einasta mistak, og tá verður tað óluksáliga tungt. Samstundis fáa vit teir ongantíð yvir í grøvina at bara lossa bóltarnar inn í brotsteigin. Tað plaga vit annars at vera dugnaligir til, men tað vildu teir bara ikki.

Nú er eitt slíkt tap ongantíð besti hátturin at byrja eina undankapping. Hvussu skulu tit bera tykkum at, um tit skulu reisa tykkum til næstu uppgávuna?

– Tað verður sjálvandi tungt, men vit mugu arbeiða víðari. Fyrst og fremst, so haldi eg tó, at fólk skulu sýna hesum nýggja liðnum álit. Spælararnir – serstakliga teir yngru – hava tørv á stuðuli heldur enn kritikki. Faá teir tað, so ivist eg ikki í, at hetta landsliðið kann menna seg heilt nógv, staðfestir Óli Johannesen.



*Føroyski liðskiparin var ikki ósamdir í, at dysturin mikukvøldið enn einaferð sýndi trupulleikarnar, sum Føroyar hava av gomlu eystanlondunum*
*Mynd: Álvur*

# Stuðlarnir halda fram

**Føroya Banki og Atlantic Airways hava longt samstarvið við FSF, har fyritøkurnar báðar halda fram sum høvuðsstuðlar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Óli Holm tykist væl nøgdur um nýggju avtaluna, sum nú er gjørt. Tað sama eru Janus Petersen og Magni Arge, hóast hesin seinni nevndi helt, at sessurin undir liðini á Óla hevði hug at gerast alsamt dýrari*
*Mynd: Álvur*

Sum vant, so varð upphæddin á sáttmálanum hildin loynilig á tíðindafundinum, men at talan er um hampuliga fitt av peningi, mundi lítil ivi vera um. Í øllum førum tók Magni Arge skemtandi til, at tað so ikki var blivið bíligari at sita undir liðini á FSF-forsetanum, Óla Holm.

Sami Óli fengaðist annars um, at teir báðir høvuðsstuðlarnir halda fram í FSF-samstarvinum.

– Tað er jú eitt stórt apparat, um føroyskur landsliðsfótbóltur framhaldandi skal rekast, og tá er neyðugt við góðum fíggjarstuðlum. Hendan avtalan gevur okkum eisini nakrar møguleikar, sum vit annars ikki høvdu havt. Og so er tað upp til okkum at gagnnýta hesar, helt Óli.

### Stolteiki og reklama

Tá stjórarnir hjá høvuðsstuðlunum báðum skuldu siga sína hugsan um fótbóltslandsliðið, tóktust teir ikki vera í iva um, at ein slík sponsoravtala samstundis er ein góð íløga hjá fyritøkunum. Tvær fyritøkur, sum annars eru eins føroyskar sum fótbóltslandsliðið sjálvt.

– Fótbóltslandsliðið er jú nakað, sum nertir allar føroyingar. Hóast úrslitini ikki altíð eru eins góð, so er hetta ein fyrimynd, sum øll í Føroyum kunnu síggja upp til. Samstundis kunnu vit við hesi avtaluni vera við til at stuðla tí velduga arbeiði, sum verður framt innan FSF, og tað er nakað, sum vit fegin vilja vera partur av, segði Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.

Hjá Magna Arge er hetta langt ífrá fyrsta ferðin, at hann situr við endan sum høvuðsstuðul. Atlantic Airways hevur ígjøgnum mong ár verið høvuðsstuðul hjá landsliðnum. Tey seinastu tvey árini saman við Føroya Banka. Men hóast áramálið nú er langt, er hann framvegis ikki í iva um nyttuna av hesum.

– Eg havi sagt tað fleiri ferðir, og eg skal fegin endurtaka tað. Tað finst eingin reklamusúla, sum kann tænn Føroyum so væl, sum fótbóltslandsliðið ger tað. Ferðaðist tú í Europa fyri 15 árum síðani, so var javnan, at tú mátti greiða fólki frá, hvat Føroyar var fyri nakað. Í dag kenna tey flestu okkara land, og í 8 av 10 førum er tað landsliðið, sum hevur verið atvoldin til hetta. Hjá okkum, sum fegin vilja flyta fólk til og úr Føroyum er tað tí púrasta náttúrligt, at vit vilja stuðla landsliðsarbeiðnum, segði Magni Arge millum annað.